# ikar í Føroyum



*Umboð fyri Geysir, Dong, Faroe Petroleum og Statoil í einum hugnaligum práti uttan fyri høvuðssæti hjá Atlantic Petroleum. Um prátað verður um, hvørjir møguleikar eru fyri at farma inn í loyvi hjá hvørjum øðrum ella um framtíðar triðju útbjóðingina er ilt at siga*

*Mynd Jan Müller*

ið hevur eitt loyvi í donskum øki og er eisini við í einum fundi í Bretlandi. Tey rokna við at framleiða kolvetni móti endanum á 2009. Felagið hevur eisini tvey loyvi í Barentshavinum umframt at felagið hevur søkt um onnur loyvi á norskum øki. Geysir fer eisini at søkja um leitiloyvi í íslendskum øki, tá útbjóðingin fer fram har um eitt ár.

Tað er felagið Sagex Petroleum, sum eigur Geysir. Størstu eigararnir eru ein norskur og ein íslendskur íleggari umframt shippingáhugamál. Umleið 32 fólk arbeiða hjá felagnum, sum í dag er eitt oljufelag burturav. Fyrr var tað eisini eitt ráðgevandi felag. Felagið arbeiðir fram ímóti at verða skrásett á børsinum í framtíðini.

## Stórar vónir

- Eg havi stórar vónir til, at olja verður funnin í Føroyum. Framvegis er leitingin ung og bert fáir brunnar eru boraðir. Vit hava ikki fingið so nógv nýggj datapunkt síðani 2. rundu men nøkur sera positiv eru komin á bretskum øki.

- Men boringin higartil hevur bara verið vónbrot!

- Brunnarnir, sum boraðir eru, eru spjaddir bæði geologiskt og geografiskt. Tað mugu vit taka hædd fyri.

Geysir ætlar sær at søkja um loyvi, tá 3. útbjóðing letur upp og Dag Larsen vónar, at tað eisini verður saman við føroyska felagnum Atlantic Petroleum, sum teir hava havt gott samarbeiði við higartil. Eisini hava teir skrivstovu saman í Havn.

- Men hví fara tit ikki heldur saman við onkrum størri felag at bjóða?

- Tað verður pláss til fleiri enn tvey feløg í einum slíkum bólki.

Atlantic Petroleum heldur sín 10 ára stovningardag í ár og hevur aðalfund leygardagin. Hvat heldur tú um felagið?

- Eg haldi at felagið er komið sera langt uppá einans 10 ár. Tað er imponerandi, at felagið hevur fingið eitt so stórt virði á børsinum. AP hevur eina framtíð, sjálvt um eingin framleiðsla hevur verið enn.



*Føroyar hava eina framtíð sum oljuframleiðari heldur Dag O Larsen, stjóri í Geysir Petroleum*